# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Alternativið sum hvarv

Í mong ár vóru landsmyndugleikar sannførdir um, at ferðavinnan skuldi gerast eitt gott og álitandi alternativ til fiskivinnuna. Nógv varð gjørt frá almennari síðul nadi og kommunum, til tess at menna eina føroyska ferðavinnu. Hotel- og gistingarhúsvinnan hevur ikki staðið aftanfyri hitt almenna, og alt bendir á, at vit á hesum øki hava allar teir hentleikar, ið nútímans ferðafólk krevja og vænta, ta ið tey koma til fremmant land.

Ferðvinnumyndugleiki, eitt ferðaráð, varð sett á stovn og gjørdi hetta ráð eitt stórt og dygdargott arbeiðið ikki minst við Hera Niclasen, sála, sum leiðara. Eftirfylgjandi varð hesin stovnur lagdur saman við annan almennan stovn, Menningarstovuna, og síðan aftur til ein triðja stovn, Samvit. Men áðrenn Samvit so at siga hevði fingið umrátt seg, var hesin stovnur í óðum verkum lagdur saman við nýggja uttanríkisráðið, ið enn ikki hevur funnið síni egnu bein enn minni sín egna samleika.

Tað er møguligt, at alt hetta, sum frálíður, gagnar ferðavinnuni. Vit og mong við okkum ivast, og vit bíða framvegis eftir eini haldgóðari frágreiðing frá uttanríkisráðharranum um veruligu og sakligu orsøkirnar til hesa løgnu samanleggin. Avgerðin var politisk og so var ikki meira um tað – sum um ein politisk avgerð ikki krevur eina sakliga og fakliga grundgeving! Her ruggar ikki rætt og almenningurin hevur krav uppá eina haldgóða frágreiðing. Vónandi verður hetta tikið upp á tingi. Málið hevur stóran almennan áhuga, tí júst í hesum døgum kemur fram, at ferðavinnan er fyri stórum bakkasti. Meðan ferðavinnan hóast altjóða kreppu ikki tykist munandi nervað í okkara grannalondum, fáa vit færri og færri ferðafólk hendan vegin. Vinnan, ið skuldi gerast eitt alternativ, er í kreppu. Gistingarhús boða frá færri gistingum og flogferðslan frá færri bíløgdum ferðaseðlum.

Her sostatt nakað heilt galið við okkara ferðavinnupolitikki og avvarandi myndugleikar eiga at leggja høvur í blot til tess at finna út av, hvat ið vit hava gjørt skeivt og hvat, ið kann gerast til tess at venda hesi syndarligu gongd. Hetta verður ikki gjørt við illa umhugsaðum samanleggingum, her skal annað og meira til. Seinastu árini hevur nógv verið talað og skrivað um okkara kappingarsamleika, og verkætlan er hesum høpi skipað. Navnframir útlendskir serfrøðingar eru knýttir at verkætlanini, men úrslitið er hitt sama: tað eydnast okkum ikki í eins stóran og grannum okkara at fáa ferðafólk hendan vegin. Hetta er mikið spell, tí ferðavinna kundi verði eitt sera gott og sterkt alternativ. Útlendski serfrøðingurin Simon Alholt, sigur okkum, at Føroyar eru unikar, ein gimsteinur í ferðavinnuhøpi. Hetta hava vit altíð vitað, vit hava bara ikki væl dugað at nýta hetta til at menna økið til ein hornastein í búskapinum. Vónandi fer hetta nú at eydnast og vónandi kemur eitthvørt gott burturúr vitjan Anholts og tí verkætlan, sum hann er partur av. Vit hava her eitt eykabein, sum vit mugu royna at nýta.

**Sosialurin**

## Landið herðir bara kreppuna

**HEÐIN MORTENSEN**
borgarstjóri í Tórshavnar kommunu



**Daprar ræðumyndir frá landspolitikarum um, hvussu stórt almenna hallið í Føroyum er og verður, eru lítið gagnligar. Reyðu tølini byggja einki upp, men sáa mistreysti niður í fólk. Hesum taka vit í høvuðsstaðnum ikki undir við, men vilja sáa treysti**

Kropp á kroppi tosa landsstýris- og løgtingsmenn um, hvussu álvarslig fíggjarliga og búskaparliga støðan er, og eitt nú sleingja teir um seg við tølum um, hvussu stórt hallið fer at verða og hvussu illa tað fer at standa til.

At neyðugt er við átøkum, ið kunnu betra støðuna, eru øll greið yvir. Hví so ikki bara fremja tey, heldur enn at koma við einari støðulýsing fyri og aðrari eftir? Og hví ikki brúka verulig tøl, heldur enn at leggja tøl fram, sum ikki geva røttu myndina av veruligu støðuni?

Um vikuskiftið var kommunala skuldin brádliga drigin inn í myndina, og harímillum var nevnt, at Tórshavnar kommuna er sera tyngjandi fyri støðuna í kommunala geiranum, tí kommunan hevur eitt hall upp á 105 milliónir krónur.

At júst hetta verður tikið fram sum ein ræðandi faktor, fær undirritaða at spyrja seg sjálvan, hvussu nógv so man vera um alt hitt, ið verður sett fram í hesum døgum. Snøgt sagt, tí tað skal ein heilt ótrúliga góður vilji til at síggja hallið hjá Tórshavnar kommunu sum ein tyngjandi faktor fyri onnur.

Tað er jú ein gomul meginregla, at í ringum tíðum er skilagott at seta arbeiði í gongd, sum kann kasta nakað av sær og loysa ítøkiligar trupulleikar. Tað er beinleiðis út frá hesum, at Tórshavnar kommuna hevur tikið 109 milliónir krónur í láni til fígging av nýggjum skúla á Argjum.

### Ikki til hol í jørðina

Tá hetta nú verður vent á høvdið og gjørt til ein stóran trupulleika, mást tú veruliga klóra tær í nakkanum, tí samstundis arbeiðir løgtingið »seriøst« við einum ørvitisprosjekti fyri og øðrum eftir, sum bara kosta og einki kasta av sær. Tunlar í hópatali fyri ørandi upphæddir eru bestu dømi um, at skomm er ikki skapt í teimum, sum skulu eitast at leiða landið ígjøgnum kreppuna.

Og nú vit tosa um skúlar, so hevur Tórshavnar kommuna síðstu árini gjørt ítøkiligar íløgur í yngra ættarliðið og framtíðina, tí vit hava bygt og byggja skúlar fyri 400 milliónir krónur. Samstundis hava hvørki landsstýri ella løgting enn funnið og framt nakra loysn á miðnámsskúlaøkinum, so eg vil ráða frá, at steinað verður meira úr landspolitiska glashúsinum!

At hallið hjá Tórshavnar kommunu skal brúkast sum ræðumynd, er langt úti, tí gamaní hava vit tikið lán, men raksturin hjá kommununi hvílir í sær sjálvum, og talan er um lán til íløgur, sum fara at síggjast aftur og skapa virksemi mong ár fram í tíðina. Her er ikki talan um hol í jørðina!

Tí skal mín áheitan á bæði løgtings- og landsstýrisfólk vera, at tey gevast við at mála daprar ræðumyndir um, hvussu stórt almenna hallið í Føroyum er ella verður, eru tær lítið gagnligar. Reyðu tølini, sum kappast verður um at leggja fram, byggja einki upp, men sáa bara mistreysti niður í fólk.

Hetta vilja vit í høvuðsstaðnum ikki vera við til, tí vit vilja sáa treysti og síggja glottan aftan fyri tey kanska heldur myrku skýggini. Eg ivist í, um okkara landspolitikarar vita, hvussu stóran skaða teir gera, nú teir bara mála við svørtum. Tí hava vit ikki brúk fyri í einari kreppu, tá mest ræður um at hava eina leiðslu, sum torir og dugir at stýra og samstundis eggjar manningini til at gera sítt besta.

## Endurtekur søgan seg?

**TÓRBJØRN JACOBSEN**



Eitt valalið av handilsreisandi føroyingum hava verið í móðurlandinum Danmark og lýst fyri nýggjum føroyskum lánsbrøvum. Universitetsrektarin, finansministarin, jarðfrøðingurin og mr. Economy himself Sigurð Poulsen.

Eitt av heimsins størstu landsbankarottum í seinastu øld hendi í Føroyum í 1992. Við fullari ríkisveiting og politiskari vanstýring sigldi skútan seg undir kav. Mesti undanvindurin undir loringina kom úr landsuðri. Ábyrgdarloysi í heimastýrinum og møgulig markleys lánstøka umvegis danskt lánsføri var orsøkin.

Nú vit standa við fótin á einum fíggjarlógarhalli á 2 milliardir krónur næsta hálva annað árið, og ABC-samgongan hevur hildið sær á góðum við fænum úr Føroya Banka og Atlantsflog, sæst botnurin aftur í landsins kassa.

Hvørji eru tá ráðini til at taka?

Sambært Portalinum/ Sosialinum the same prosedure sum fram til kreppuna í 92. Stórir íleggjarar hava, sambært Sigurði Poulsen, sýnt føroysku skuldarbrøvunum áhuga, tí at útlitini í føroyska búskapinum ikki eru so galin, og tí at mann roknar við, at (og haldi tykkum nú fast(!)) Danmark er eitt slag av bakki aftanfyri.

Endurtekur søgan seg og hevði ein fyrrverandi formaður í Búskaparráðnum rætt, táið hann ivaðist í parta- og valdspolitiska óheftinum hjá Landsbankanum?

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.